


*Elin Lindenskov, forkvinna í heilsu- og umhvørvisnevndini hjá Tórshavnar kommunu, setti umhvørvisvikuna í spuldurnýggju hølunum hjá býarbókasavninum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Fimm fingu umhvørvis-stuðul

**Tórshavnar býráð hevur býtt umhvørvisstuðulin á 250.000 krónur út til fimm umsøkjarar, sum fingu frá 5.000 krónum upp til 102.000 krónur.**

Leo Poulsen

Snjósniglar og annað smákykt er verkætlan hjá Føroya Sjósavni, sum frá kommununi fær 93.000 krónur, ið Bjørki Geyti tók ímóti.

Strok fekk 10.000 krónur til at gera eitt videolag av »Lort í býin«, og tað var Beinta Johannesen, ið tók móti stuðlinum.

Forlagið Hellurnar við Poulu Eidesgaard fekk 40.000 krónur til ein faldara um skiljing av ruski í barnagørðum og vøggustovum.

William Simonsen fekk størsta stuðulin, 102.000 krónur til verkætlanina Náttúran í Nólsoy.

Hans Fróði Jensen og Jóannes E. Árting frá Argja skúla fingu 5.000 krónur til verkætlanina Sólorku kappkoyring á Argja skúla.



*William Simonsen fekk størsta stuðulin, 102.000 krónur til verkætlanina Náttúran í Nólsoy.*

# Fokus á vinnuna

**Hesa vikuna verður sett fokus á umhvørvisvinarliga vinnu í kommununi. Málið er, at øll gerast meiri tilvitað um umhvørvið í síni heild, segði Elin Lindenskov.**

- Kommunan eigur at ganga á odda tá tað ræður um orkusparingar og –betringar, og málið í ár er, at allir kommunalir stovnar og virkir skulu spara 10% í orkunýtslu, segði Elin Lindenskov, forkvinna í heilsu- og umhvørvisnevndini hjá Tórshavnar kommunu.

Hetta er ein liður í ætlanunum hjá kommununi at spara orku.

- Tá nýggir bygningar verða bygdir ræður um at byggja so umhvørvisvinarligt sum gjørligt, og nú grivið verður út fyri nýggja Boðanesheiminum er avgerð tikin um, at heimið skal hitast upp við sjóorku, ið er góð varandi orka, segði Elin Lindenskov.

Hetta er sjeyndu ferð, at skipað verður fyri umhvørvisviku, tó at tað fyrstu ferðirnar var talan um umhvørvisdagar. Tema'ini hava verið ymisk og fleiri ganga aftur.

- Tað eina árið varð fokus sett á hundaposar, og í tí sambandi varð kendea lagið, »Lort í býin« gjørt og framført. Undirvísingartilfar, Rusk í skúlanum, ókeypis bussleið og Tinghúsið á Hjalla eru nøkur av tiltøkunum, ið framd eru í undanfarnum umhvørvisvikum, segði Elin Lindenskov.

Fokus hevur verið sett á vistfrøðiligar matvørur, $CO_2$ útlát, og í fjør var temaið áin, vágin og fjøran.

## Ráðstevna

- Í ár er tað vinnan, sum skal í fokus, og í tí sambandi hava vit ætlanir um at tað skal verða beti og lættari hjá vinnuni at sleppa av við burturkastið, og tað fara vit at hoyra meira um seinni í vikuni, segði Elin Lindenskov, tá hon setti umhvørvisvikuna á býarbókasavninum í morgun.

Hon segði, at kommunan hevur verið víða um, og at nøkur av málunum eru nádd, tó at langt er eftir á mál.

- Á skránni fyri umhvørvisvikuna eru væl umtóktu barnatiltøkini Umhvørvisveiða, sum Margarinfabrikkin skipar fyri, og teknikappingin á barnabókasavninum. Somuleiðis eru ruddingardagar og Plantið eitt træ á skránni, segði Elin Lindenskov.

Fríggjadagin verður so ein ráðstevna um umhvørvisleiðslu og grøna marknaðarføring í Norðurlandahúsinum.

- Ráðstevnan er ætlað at geva vinnuni íblástur og amboð í víðari menningini á umhvørvisøkinum, og hóast ráðstevnan er ætlað vinnuni, eru sjálvandi øll vælkomin við, segði Elin Lindenskov.

Umhvørvisvikan endar við einari spennandi gonguferð fram við Sandá sunnudagin.